## 52 bankar á húsagang

Seks teir fyrstu mánaðirnar í ár fóru ikki færri enn 52 amerikanskir bankar á húsagang. Sostatt fóru tveir bankar á húsagang um vikuna, men í síðstu viku bar av, tí tá máttu ikki færri enn sjey bankar boða myndugleikunum frá, at teir kundu ikki halda fram. Amerikanskir fjølmiðlar skriva, at tað eru yvirhøvur smáir og meðalstórir bankar, sum fara av knóranum. Teir flestu húsagangirnir hava verið í Kalifornia, men av teimum sjey, sum fóru í síðstu viku, vóru seks í Illinois. Tann sjeyndi var íTexas, skrivar AP. Sambært tíðindastovuni hava húsagangirnir higartil í ár kostað innskjótaratrygdargrunninum 12,3 milliardir dollarar.



## Mugabe hvassorðaður

Forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, er ikki tann, sum altíð vandar sær so væl um orðini, og táð gjørdi hann heldur ikki, tá hann nú um dagarnar tosaði um Afrika-sendimannin hjá ST, amerikanaran Johnnie Carson. Samblrt Mugabe er hann býttlingur. Mugabe vil vera við, at ST-sendimaðurin er nasadjarvur, tí hann heldur seg hava rætt og førleika til at siga afrikonsku leiðarunum, hvussu teir skulu stýra sínum londum. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Mugabe sigur sína hjartans hugsan um umboð hjá ST. Sendikvinnuna Jendavi Frazer kallaði hann "eina amerikanska teys, sum ferðast kring heimin sum ein skøkja."

# Aldargomul smúkkulist í Ribarhúsi

**Smúkkur, gjørdar eftir aldargamlari tøkni, eru kjarnin í listini hjá Michael og Anette Arleth, sum í løtuni hava listaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Fyri Anette og Michael Arleth eru smúkkur ikki bara prýðislutir, men skulu hugsast sum partur av kroppinum hjá tí einstaka*

Tey fevna víða eftirhondini listarliga, tey bæði Michael og Anette Arleth og sonur teirra Rune Arleth, sum í løtuni hava felags framsýning í Gallerí Ribarhúsi í Fuglafirði. Framsýningin umfatar smúkkur, bronsuskulpturar og 16 fotocollagir.

### Tað stóra í tí smáa

Meðan listarliga spektrið hjá Arleth familjuni soleiðis allatíðina veksur, tykist listarliga tilgongdin framvegis at goyma seg í smáu smúkkunum, sum Anette og Michael Arleth eru so kend fyri.

Líka frá byrjan hava smúkkurnar verið kjarnin í teirra listalívi. Fyri tey eru smúkkurnar ikki bara ein prýðislutur, men eru heldur at meta sum smámyndir, har ævigi tvídrátturin millum form og funktión endurspeglast niður í minsta smálut. Ikki minst tí smúkkulist eisini má hugsast sum partur av kroppinum.

- Kroppar eru so ymiskir, og tað skulu smúkkurnar endurspegla. Tær skulu bæði undirstrika persónligheitina hjá henni ella honum, sum ber smúkkuna, umframt at tær onkursvegna skulu útrykka listarliga lyndið hjá listafólkinum. Smúkkur eru smá listaverk, sum vísast fram millum menniskju - á kroppinum, vísa tey bæði á.

Grundtilfarið í smúkkunum er gull og silvur, sum ofta er flættað saman við øðrum, rættiliga óvanligum tilfari í nýskapandi samansetingum, sum geva smúkkunum ein persónligan og ofta humoristiskan dám. Til dømis er ikki óvanligt at hóma bæði flintstein, hestahár, ormahylki og smá glaspetti í smúkkunum.

Ofta nýta tey sonevnda perdúe tøkni, sum stavar frá fornøldini, tá fólk nýttu bivoks og leir sum formar at stoypa gullgripir við. Á hendan hátt gongur ein reyður tráður ikki bara gjøgnum listaverkini men eisini heilt aftur til eina listarliga frumtøkni, tey fægstu kenna til í dag.



*Í størru verkunum á framsýningini sleppur smáheimurin í smúkkulistini at breiða seg út á støðugt nýggjar mátar*

Hóast tað eru evarsmáu detaljurnar, sum gera munin í smúkkunum, tykjast størru standmyndirnar onkursvegna at vaksa út úr smúkkunum. Á tann hátt kunnu standmyndirnar síggjast sum ein mótsetningur til ella ein maki hjá mikrokosmos í smúkkunum, har tilfar sum bronsa, flint, træ og glas verður kannað og hugsað inn í størri, fræls verk í almenna rúminum.

Framsýningin er at síggja í Ribarhúsi fram til 9. juli.

# Norðurlond í listarligari rammu

**Í fyrilestri í kvøld fer Dr. Stuart Burch at viðgera listarliga rammuhugtakið og greiða frá síni verkætlan um list og listasøvn í Norðurlondum**

FYRILESTUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 19 verður Listaskálin karmur um ein heldur øðrvísi fyrilestur hjá Dr. Stuart Burch, sum starvast á Nottingham Trent University í Onglandi, har hann er yvirlektari í savnsog arvleiðslu á hugvísindadeildini.

Evnið í fyrilestrinum er "rammur" í breiðastu listarligu merking. Í skrivi vísir Listasavnið á, at rammur hava sera stóran týdning, tá ið talan er um list. Kortini verða rammur alt ov ofta tiknar fyri givið ella snøgt sagt ikki virdar. Hetta snýr seg bæði um prýðiliga markið runt um ein málning eins og stabbar undir høggmyndum.

Men eisini er talan um aðrar rammur. Arkitektonisku rúmini í søvnum og gallaríum ramma tey verk inn, sum eru í tí. Framsýningar seta tematiskar rammur fyri úrval av ávísum verkum, og hvussu tey verða sýnd fram. Katalog og ummæli mynda eina kritiska og eftirmetandi rammu. Listfrøðin er grundarlagið fyri eina akademiska rammu, ið setur listafólk og verk inn í skúlar, rørslur og tjóðskaparlig høpi.

Við støði í hesum fer fyrilestrarhaldarin at viðgera rammuhugtakið og greiða frá núverandi granskingarverkætlan síni um list og listasøvn í Norðurlondum. Við hesum er beinanvegin ein landafrøðilig ramma íkomin: Norðurlond. Ber til dømis til at lýsa hetta landaøkið nágreiniliga út frá ávísum eyðkennum? Ella er hugskotið "Norðurlendsk list" eitt hugtak: ein ramma uttan innihald? Hvat halda føroyingar um hetta? Hvussu síggja Norðurlond út í eygunum á føroyingum? Og hvussu passar listin í Føroyum inn í nútíðar savnslandslagið í Norðurlondum?

Fyrilesturin, sum verður í Listaskálanum týsdagin 7. juli kl. 19.00, er partur av einum fýra ára granskingarverkætlan, ið kallast "Norðurlendsk rúm" (Nordic Spaces). Fyrilesturin verður á enskum og varar slakar 40 minuttir. Høvi verður at seta spurningar.



*Rammur í breiðari listarligari merking verður evnið í fyrilestri í Listaskálanum í kvøld*